## Regnið argar Rangers

Skotska stórfelagið Rangers úr Glasgow hevur fingið stórar trupulleikar av vánaliga veðrinum í Skotlandi seinastu vikuna. Tveir av teimum seinatu dystunum hjá felagnum eru avlýstir orsaka av regni, og tað kemur aftur um brekku, tí dystarskráin hjá felagnum verður enn tættari, enn hon hevur verið. Umframt heimligu kappingarnar er Rangers eisini við í UEFA Cup, spælararnir fáa úr at gera næstu mánaðirnar.



## Bayern bukaði kinvejar

FC Bayern fyrireikar seg til seinnu hálvu av týsku landskappingini við eini ferð til Kina. Um vikuskiftið spældi Bayern ímóti kinesiska OL-landsliðnum, sum ætlandi skal klára seg væl á Olympisku Leikunum í Bejing, og tað gjørdist til stórsigur. Bayern, sum nú hevur Jurgen Klinsmann sum venjara, vann heili 7-2 á kinesiska liðnum.

# Tætt oddastríð í Premier League

**Um vikuskiftið var aftur fult umfar í Premier League, og tey sum fylgja við Premier League fingu eina rúgvu av málum at síggja, umframt nøkur heldur óvæntað úrslit – stórsigur til United, sigur til Sunderland og mangt annað**

**FÓTBÓLTUR**
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

22. umfar av Premier League varð spælt um vikuskiftið, og ikki sørt av óvæntaðum úrslitum stóðust burturúr. Millum annað kom Newcastle við einum ússaligum høkjuliði til Old Trafford, har teir snøgt sagt blivu sorlaðir sundur og saman av Manchester United. 6-0 í einum dysti, har man ikki skuldi trúð at liðini bæði vóru úr somu deild.

Aðrastaðni heldur, ungi maðurin í venjarahøpi, Roy Keane fram við at koma við góðum úrslitum, Hesaferð vóru tað Portsmouth, ið fingu toyggið. Annars er vert at nevna, at Chelsea fingu aftur fult, og Arsenal snávaðu í oddastríðnum.



*Cristiano Ronaldo hevur skotið 50 mál, síðani hann kom til ensku Premier League. Men leygardagin var fyrsta ferðin, at hann skeyt hattrick*
*Mynd: Polfoto/AP*

### Synd í Newcastle

Manchester United eru í einum sera góðum stima júst nú, og eftir hetta vikuskiftið munnu teir ikki hava minni vónir um at endurvinna meistaraheitið. Men skuldi tað hent seg at teir møta mótstøðu - nakað, man ikki kann siga at Newcastle leveraðu, so kanska teir eisini snáva, eins og Arsenal gjørdu tað, móti Birmingham, ella Liverpool gjørdu tað móti Middlesbrough.

Newcastle vóru gamaní uttan venjaran, Sam Allardyce, ið teir júst hava givið sekkin. Big Sam, ið kom frá Bolton, fyri knapt átta mánaðum síðani, fekk ongantíð veruliga møguleikan. Hann arvaði eitt lið í nærum totalari upploysn, og royndi at byggja tað uppaftur, men tolið á leiðsluni í Newcastle var ikki nóg gott, og tá góðu úrslitini ikki komu, so fekk hann sekkin.

### Koyrir væl hjá Chelsea

Chelsea hava verið í sera góðum stima síðan teir taptu 1-0 móti Arsenal. Fimm teir seinastu dystirnar hava teir vunnið fýra og spælt ein javnleik. Sjálvt um teir skoraðu fýra mál í dystinum fingu teir bert javnleikin, tí Aston Villa skoraði tá eisini fýra. Hesaferð vóru tað grannarnir og arvafiggindar teirra úr Tottenham, ið vóru á vitjan. Dysturin endaði við 2-0 sigri, og Avram Grant gav debut-dyst til Nicolas Anelka, hóast hann eftir dystin segði, at hetta ikki var nakað, hann hevði ætlað sær.

-Vit eru so illa raktir av skaðum fyri tíðina, og tá so samstundis African Cup Of Nations er, ja so er eyðsæð, at vit hava ein tynri hóp. Tá vit so eisini missa Pizarro við skaða, ja so var onki annað val, segði Chelsea venjarin við BBC-5-LIVE.

### Arsenal snávaðu

- Arsenal hava í dag spælt sín vánaligasta dyst í hesum kappingarárinum, og hetta fara vit at læra av, sigur Arsene Wenger, tá hann eftir dystin skuldi lýsa hann fyri fjølmiðlunum.

Arsenal fingu bert 1-1 javnleik á heimavølli móti Birmingham, eftir at hópur teirra var skerdur á týdningarmiklum plássum. Tomasz Rosicky, Robin Van Persie, Kolo Touré, Eboue, og aðrir. Allir hesir vóru ikki við, og hetta eru leikarar, ið allir høvdu verið í byrjunaruppstillingini, høvdu teir verið tøkir.

**FAKTA**

**Úrslit, Premier League**

| | |
|---|---|
| Arsenal-Birmingham | 1-1 |
| Aston Villa-Reading | 3-1 |
| Chelsea-Tottenham | 2-0 |
| Derby-Wigan | 0-1 |
| Everton-Man. City | 1-0 |
| Middlesbrough-Liverpool | 1-1 |
| West Ham-Fulham | 2-1 |
| Man. Utd.-Newcastle | 6-0 |
| Sunderland-Portsmouth | 2-0 |
| Bolton-Blackburn | 1-2 |

## Durita gull og Gerda silvur í NM

**Ungu føroysku rógvararnir kláraðu seg ógvuliga væl í Norðurlandakappingini í innróðri, sum um vikuskiftið var í Landskrona í Svøríki**

**INNIRÓÐUR**
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Besta úrslitið fekk Durita Wang Jacobsen og Gerda Olesen úr Miðvágs Róðrarfelag. Oyvind Lützen sett nýtt føroyskt met, og Annfinn Sivertsen var bara brotpart av sekundi frá føroyska metinum

Úrslitini frá NM í inniróðri, sum var hildin í Landskrona í Svøríki:

Durita Wang Jacobsen úr Miðvágs Róðrarfelag nr 1 (gull) í bólkinum gentur 13 til 14 ár 500 metrar við tíðini 1:52,9

Gerda Olsen úr Miðvágs Róðrarfelag nr 2 (silvur) í bólkinum gentur 14 til 15 ár 500 m við tíðini 1:51,3

Oyvind Lützen úr Havnar Róðrarfelag nr 4 í bólkinum dreingir 15 til 16 ár 1000 metrar við tíðini 3:18,3 (nýtt føroyskt met)

Anfinn Sivertsen úr Nordepil- og Hvannasunds Róðrarfelag nummar 4 lættvekt í bólkinum menn 19 til 22 ár 6:23,9 sek (Føroyska metið eigur Lars Abrahamsen frá NSÍ við tíðini 6:23,5. Var sett í kappingini hjá HR í 2007)